## Tíðaravmarkað starv í Føroya Skúlabókagrunni

Fyri eitt av starvsfólkum okkara í farloyvi verður tíðaravmarkað avloysarastarv í Føroya Skúlabókagrunni, frá 1. august 2003 til 1. august 2004, lýst til setanar.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, her undir ráðgeving og vegleiðing at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava kunnað seg við tørvin á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, yrkisligur førleiki, góður kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi ikki seinni enn 19. mai 2003.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, Heðini M. Klein, á telefon 316100.

Tórshavn, 10. apríl 2003

Føroya Skúlabókagrunnur
Skúlabókanevndin
Lützenstrøð 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100 · www.fsg.fo

## LANDSVERKFRØÐINGURIN

## ÚTBJÓÐING

Við hesum verður arbeiðið viðv. gerð av nýggjari samferðsluhavn á Trongisvágsfirði í Suðuroynni, boðið út í almenna lisitasjón.

Arbeiðið umfatar í stuttum, gerð av bryggju og brimgarði ávikavist uml. 140 m og 200 m, ferjulegu, tilhoyrandi parkeringsøki og vegíbinding v.m.

Høvuðsnøgdirnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Jørðarbeiði | 4100 m³ |
| Dýping | 71000 m³ |
| Spreinging | 117000 m³ |
| Uppfylling og planering | 197000 m³ |
| Spuns- og stálarbeiði | 725 t |
| Stoypiarbeiði | 1980 m³ |

Lisitasjónin verður hjá Landsverkfrøðinginum, Tinghúsvegi 5, í Tórshavn, mikudagin 18. juni 2003 kl. 14.00

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 19. mai 2003 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støðdar kr. 15.000,00, ið verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent í seinasta lagi tvær vikur aftan á lisitasjónina.

Adressa:
Landsverkfrøðingurin,
Postboks 78,
Tinghúsvegur 5,
110 Tórshavn
Telefon 311333, Telefax 314986,
Teldupostur eli@lv.fo

**Landsverkfrøðingurin**

## Handilslærlingur

**Skemmuna søkir lærling m/k**

**Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla**
**Møguleika fyri arbeiði í útlandinum við stórum avbjóðingum**

**Hetta vænta vit av tær:**
At tú ert samstarvsfús/ur, ert sjálvstøðug/ur, hevur nógva orku og áræði, er opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Krav:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst **FHS ella onnur miðnámsútbúging.**

FHS næmingar sum verða lidnir í summar eru eisini vælkomnir at søkja.

Kundi tú hugsa tær, at blivi ein av okkum so send okkum eina skrivliga umsókn.

Umsøknin skal verða okkum í hendi **innan 28.mai 2003**
Meira fast at vita við at ringja til okkum og tosa við Dan.

**Umsøknin skal sendast til.**

**Skemmuna**
**Staravegur 7**
**Boks 3278**
**Fo 100 Tórshavn**
**Tlf. 315588**

SKEMMAN

## Lærarar til skúlarnar í Tvøroyrar kommunu

Skúlastýrið í Tvøroyrar kommunu søkir eftir lærarum til skúlarnar í kommununi skúlaárið 2003/2004.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2003/2004, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

1 lærari at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi.

2 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna og 1 lærari at undirvísa niðursetta tíð fyri lærarar, sum hava niðursett tímatal ella eru á skeið.

Upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til skúlastjóran, tlf. 371582.

Umsóknir við prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 6. juni 2003.

**Skúlastýrið í Tvøroyrar kommunu**
v/ Katrin Mortensen
FO-827 Øravík

## Lastbilar til sølu

**VOLVO F 12** 8x4 vi ðskiftilast og 25 tm krana. Kranin røkkur 22 metrar og hevur veirspæl.

**VOLVO F 12** 6x2 dumpari við skiftilast.

**Tlf. 219899**

## Koyrikort

Nýtt skeið til persónbil byrjar á Tórshavnar Trafikkskúla, Slættanesgøta 5 mikudagin 21.05. kl. 17.30.

**Hammers Koyriskúli**
Tlf. 31 88 21 · fartel. 57 39 40

## Hús til sølu

Húsini á Bumshamarsvegi 15 í Klaksvík til sølu fyri hægstbjóðandi.

**Áhugað ringið 456225**

## Arbeiðshandskar

**til øll endamál - bæði á sjógvi og landi**

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820

## GARAGUHURÐAR

**til privat og vinnuligt**

- Aluminium
- Stál

**pf Klement Petersen**
Høgabøl • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

**veitst tú ikki tað?**



## Deildarskrivari

**Søgu- & Samfelagsdeildin**
**Fróðskaparsetur Føroya**

Søkt verður eftir deildarskrivara á Søgu- & Samfelagsdeildina frá 1. juli ella so skjótt sum til ber.

Deildarskrivarastarvið er á eini setursdeild í menning. Umframt vanligt skrivstovuarbeiði fevnir arbeiðið um fyrisiting í sambandi við undirvísing, próvtøkur og fundir á deildini. Tað er nógv samskifti við studentar, lærarar, granskarar og hini í fyrisitingina á setrinum. Deildarskrivarin er høgra hond megindeildarráðsformansins.

Hjá tí sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt, hevur hug at samskifta og samstarva við onnur, hevur góðan kunnleika í føroyskum og enskum, í fíggjartøl (ávísingar) og edv, er talan um eitt sera áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er 3/4 starv og verður lønt í 3. flokki sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jóan Paula Joensen (tlf. 352585 Teldupostur: jopajo@ setur.fo) ella til Ernu Háberg (tlf. 352580, Teldupostur: ernah@setur.fo)

Umsókn við lýsing av tær sjálvum/sjálvari, avriti av prógvum, váttan um arbeiðsroyndir, viðmælum o.ø. verður at senda Søgu- & Samfelagsdeildini í seinasta lagi 12. juni 2003.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Søgu- & Samfelagsdeildin
J.C.Svabosgøta 7
100 Tórshavn

## Mentamálaráðið
**Aðalskrivstovan**

# Løgfrøðingur/Fulltrúi

**Starvið:**
Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi er leyst at søkja í aðalskrivstovuni.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- Lógarfyrireikandi arbeiði, kunngerðir og reglugerðir innan málsøkið
- Løgfrøðilig ráðgeving og vegleiðing til starvsfólk, stovnar og borgarar
- Vegleiðing og kunning um nýggjar lógir o.a.
- Umsiting av málsøkjum, sum verða løgd til tín
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð
- Aðrar uppgávur

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur løgfrøðiligt embætisprógv.

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir úr øðrum starvi. Harumframt skalt tú bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í arbeiðsbólkum o.ø.

**Vit bjóða:**
- Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir
- Samstarv við royndar løgfrøðingar
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. mai 2003. Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 50.

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Í **aðalskrivstovuni** eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin er býtt í 3 deildir - fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild - sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.*

## Fyrstafloks seyðahegn

**50x90cm**
**Yvir og undirtráður 3mm**
**Millumtráður 2,5mm**
**Meskavídd**
**B: 15cm - H: 14cm til H: 22cm**
**Galvanisering 240g/m²**

**EINANS 375,-**

**Fa. H.J.Michelsen**
Handan Á 6, 100 Tórshavn
tlf. 314414 - 214414

Klipp & goym

## FA. GRAVSTEINAR




Opi¶: m nadag - fr ggjadag $9^{00}$–$17^{00}$
annars samb rt avtalu.

V¿ruskr kann f ast!

Sj nband - 31 77 74

## Landssjúkrahúsið
FO 100 Tórshavn

## Skrivari til Ljósmøðraskipanina

Á Ljósmøðraskipanini á Landssjúkrahúsinum er eitt hálvtíðar avloysarastarv sum skrivari leyst til setan skjótast gjørligt og varandi til og við 31. desember 2003.

Løn- og setanarviðurskifti smb. sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jytte Joensen, virkandi leiðandi ljósmóðir, telefon 313540, lokal 169.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er mikudagin 30. mai 2003

## Tríbekkur til sølu

So gott sum nýggjur tríbekkur bíliga til sølu. Longd 6 m.

Áhugað ringið 332402 ella 332700

**Sosialurin**